

eisini meir og verða harvið eisini lættari vónbrotin. Øll vilja vit uppliva tað heilt stóra forelskilsi, og tí kann grái gerandisdagurin tykjast sum ein órímilig avbjóðing. Nógv klára tað heldur ikki, og so byrjar veiðan eftir einum nýggjum forelsklisi, tí the show must go on.

Men hóast hjúnarskilnaðir og støk fylla alsamt meir í hagtølunum, hava familjuvirðini ongantíð havt størri týdning enn í dag, heldur professarin.

– Fólk giftast jú sum ongantíð fyrr, og fyri tey allarflestu hongur tað saman við teirra ynski um at fáa eina familju og skapa tryggar karmar kring hana. Tí er tað eisini heilt vanligt, at fólk sum hava trý børn og hava livað saman í áravís, knappliga vilja giftast. Kanska er hetta tekin um ein enn størri tørv á at verja familjuvirðini og kærleikan, netupp tí tað tykist sum at kærleikin er vorðin meir skroypiligur, sigur Jóan Pauli Joensen.

Sorgin er hinvegin eins stór, tá kærleikin ikki vísir at vinna á øllum kortini, minnir hann á. Tí er tað kanska eisini gott at liva í eini tíð, har tað ikki nýtist at vera verðsins undirgangur, at brudleypið ikki livdi upp til stóru væntaninar.







*Myndir frá bókini hjá Jóan Paula Joensen **I ærlige brudefolk**, um brúdleyp og brúdleypssiðir.*

